MENTAMÁLARÁÐIÐ

Februar 2015

# Ljóðbøkur og e-bøkur

## Álit um almennar ljóðbókatænastur og e-bókatænastur



# Innihald

Almennar ljóðbóka- og e-bókatænastur....3
Niðurstøða....4
Tilmæli....5
Hvørjar ljóðbóka- og e-bókatænastur skal landið veita?....6
Skipan av ljóðbókatænastuni....12
Skipan av ljóðbóka- og e-bókatænastu á netinum....14
Tøkniligir spurningar....16
Rættarligir spurningar....19
Niðurstøða um tørv á umlegging og nýskipan....22

ISBN 978-99918-852-5-4

**Ljóðbøkur og e-bøkur**
Álit um almennar ljóðbókatænastur
og e-bókatænastur

*Forsíðumynd: StockPhoto*

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
100 Tórshavn

Tel 306500
www.mmr.fo
Februar 2015

# Almennar ljóðbóka- og e-bókatænastur

Í august 2014 fór arbeiðsbólkur, settur av landsstýrismanninum í mentamálum, Bjørn Kalsø, til verka at viðgera spurningar um, hvørjar tænastur landið skal veita, tá tað um ljóðbøkur og e-bøkur ræður.

Orsøkirnar til, at tað er vorðið alt meira aktuelt at viðgera spurningar um ljóðbøkur og e-bøkur, og hvørjar tænastur tað almenna skal veita í hesum sambandi, eru fjøltáttaðar. Tørvurin á ljóðbókum og e-bókum er alsamt vaksandi, bæði í mun til tey, ið eru blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind, ella hava skerdan lesiførleika, í mun til menning av lesiførleikum í skúlaverkinum annars, í mun til útbúgvingar- og bókasavnstilboð og í mun til útbreiðslu av føroyskum ljóðbókum og e-bókum sum heild.

Tey, ið virka innan ljóðbókaøkið, hava víst á, at tørvur er á at fáa ljóðbókatænastuna í tryggari fíggjarligar- og skipanarligar karmar.

Somuleiðis hava bókasøvnini víst á, at tørvur er á, at føroyskar e-bøkur og ljóðbøkur verða atkomuligar á netinum umvegis landsins bókasøvn.

Tøkniliga menningin og spurningar um upphavsrætt eru eisini orsøkir til, at neyðugt er við støðutakan til, hvussu landið skipar almennu tænasturnar, tá tað um ljóðbøkur og e-bøkur ræður.

Við í arbeiðsbólkinum hava verið umboð fyri nakrar áhugapartar innan økini, og harafturat hava aðrir áhugapartar tikið lut á einstøkum fundum. Yvirskipaði abeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum ljóðaði soleiðis:

- Hvørjar tænastur skal landið veita, tá tað snýr seg sum ljóðbøkur og e-bøkur?
- Hvussu skulu hesar tænastur skipast?
- Hvørjir rættarligir spurningar eru í sambandi við hesar tænastur?
- Hvørjir tøkniligir spurningar eru í sambandi við hesar tænastur?

Arbeiðsbólkurin hevur havt 10 fundir og handar við hesum landsstýrismanninum álit um ljóðbøkur og e-bøkur og almennar tænastur í hesum sambandi.

Tórshavn, tann 6. februar 2015

| | | |
|---|---|---|
| Margreta Næss<br>Forlagið Ljóðbøkur | Jonhard Mikkelsen<br>Forlagið Sprotin | Annika Marr Poulsen<br>Felagið fyri lesi- og skriviveik |
| Annika Smith<br>Landsbókasavnið | Oyvør Dam Lassen<br>Nám | Frida Poulsen<br>Mentamálaráðið<br>skrivari |
| Arnbjørn Ó. Dalsgarð<br>Býarbókasavnið | Sonja Kjølbro<br>Forlagið Sprotin | Armgarð Weihe<br>Mentamálaráðið<br>forkvinna |
| Malan Hilmarsdóttir<br>Býarbókasavnið | Anna Maria Seloy<br>Sjóndepilin | |

# Niðurstøða

Tað er niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, at tað er ein almenn uppgáva at tryggja, at eitt nøktandi útboð av ljóðbókum eru atkomuligar umvegis eina ljóðbókatænastu. Tað er somuleiðis niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, at føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur eiga at vera til taks á landsins bókasøvnum umvegis netið.

Málbólkarnir fyri almennu tænasturnar eru blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik og onnur, sum hava tørv á atgongd til ljóðbøkur og e-bøkur javnbjóðis við aðrar tekstmiðlar. Tað er arbeiðsbólkinum greitt, at á útbúgvingarøkinum er tørvurin á ljóðbókum, e-bókum og tøkniligum amboðum støðugt vaksandi.

Síðan 2004 hevur ein stuðulsjáttan á umleið kr. 500.000 verið sett av á løgtingsfíggjarlógini til ljóðbókatænastu, sum forlagið Ljóðbøkur hevur staðið fyri. Arbeiðsbólkurin metir, at skipanin eigur at verða endurskoðað, so at ljóðbókatænastan kann verða ment og verða rikin á einum meira tíðarhóskandi grundarlagið. Leiðari/Ritstjóri fyri forlagið hevur øll hesi árini verið settur í hálvum starvi, meðan virksemið hevur verið vaksandi, og nógv arbeiðið hevur tí verið gjørt sjálvboðið.

Umframt almennu ljóðbókatænastuna eigur eisini at verða møguleiki hjá øðrum forløgum at søkja um stuðul frá tí almenna til útgávu av ljóðbókum og e-bókum.

Eisini aðrir miðlar og tøknilig amboð eru alneyðug ella hent hjá teimum, ið eru blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind ella lesiveik. Eitt nú er tann nýggja føroyska teldutalan, sum kom í 2013, eitt stórt frambrot hjá blindum og sjónveikum, og orðabankin, sum er mentur til skúlaverkið, er eitt sera hent amboð hjá orðblindum og lesiveikum. Tøkniliga menningin á økinum er stór, og tað er arbeiðsbólkinum greitt, at tørvur er á at samskipa menningina og menna almennu tænasturnar á økinum, so íløgan í hesar tænastur verður gagnnýtt so væl sum gjørligt.

Arbeiðsbólkurin er komin til ta niðurstøðu, at ljóðbókatænastan eigur at verða skipað sum serbókasavn eins og í grannalondum okkara, og at tænastan eigur at verða skipað sum partur av høvuðsbókasavnsuppgávuni á Landsbókasavninum. Almenna uppgávan eigur at verða nágreinað í eini dagføring av løgtingslóg um bókasavnsvirksemi.

At veita ljóðbókatænastu er ikki bert ein spurningur um at veita atgongd til bókasavnstænastur, men er í eins stóran mun ein spurningur um at veita brúkarum av ljóðbókum persónliga ráðgeving, vegleiðing og tænastu. Persónliga samskiftið millum ljóðbókatænastuna og brúkararnar eigur framvegis at verða raðfest og ment.

Vitan og upplýsing eigur at vera atkomulig hjá øllum borgarum landsins. Tað er tí greiða niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, at ein almenn tænasta eigur at varða av framleiðslu og útbreiðslu av ljóðbókum og øðrum neyðugum miðlum. Almenna tænastan eigur eisini at fevna um fakliga ráðgeving, tøkniliga tænastu í sambandi við útgávu og framleiðslu og umsiting av fíggjarligum stuðli í sambandi við útgávu. Harafturat eigur tænastan at virka sum samskipandi liður í mun til brúkarar, aktørar og menning á økinum.

Í mun til bókasavnstænastur heldur arbeiðsbólkurin, at landsins bókasøvn eiga at veita nettænastu við útláni av ljóðbókum og e-bókum, og at tað í hesum sambandi er neyðugt, at avtalur verða gjørdar við viðkomandi partar, og at ein tøkniligur pallur, ið skipar útlán av ljóðbókum og e-bókum, verður fingin til vega.

Bæði í mun til framleiðslu av ljóðbókum og skipan av ljóðbóka- og netbókasavnstænastu metir arbeiðsbólkurin, at tað er neyðugt, at størri fíggjarlig orka verður sett av til endamálið á løgtingsfíggjarlógini.

## Tilmæli

Mælt verður til:

1. At ljóðbókatænasta og e-bókatænasta verða skipaðar á Landsbókasavninum eftir ásetingum í løgtingslóg um bókasavnsvirksemi.
2. At arbeitt verður fram ímóti, at føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur eru til taks á landsins bókasøvnum umvegis netið, og at neyðug fígging verður fingin til vega til endamálið
3. At verkætlanarleiðari verður settur at greina almennu ljóðbóka- og e-bókatænasturnar og harundir, hvussu stór játtan er neyðug, fyri at fáa hesar tænastur at virka á nøktandi hátt.
4. At samskipan og menning av økinum verður partur av almennu tænastuni á økinum.
5. At ljóðbókanevndin við umboðum fyri áhugapartar heldur fram sum ein ráðgevandi nevnd hjá ljóðbókatænastuni.
6. At miðað verður eftir, at minst 25 % av teimum bókum, sum koma út á føroyskum, eisini verða útgivnar sum ljóðbøkur, og at játtan verður fingin til vega til endamálið.
7. At almenna ljóðbókatænastan, saman við viðkomandi pørtum, greinar tørvin á undirvísingartilfari til blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik, og at nøktandi fígging verður sett av til endamálið.
8. At miðað verður eftir, at tilfar til undirvísingar og skúlabrúks, sum verður framleitt við almennum stuðli, verður gjørt atkomuligt hjá øllum brúkarum.
9. At virka verður fyri, at forløg kunnu søkja um almennan stuðul til útgávu av ljóðbókum.
10. At almenna ljóðbókatænastan kannar, hvussu samstarvast kann við Nota og e17 um, at føroyskt tilfar verður tøkt har.
11. At avtala verður gjørd við forløg og upphavsrættarhavarar, ið gevur bókasavnsbrúkarum atgongd til at lána føroyskar e-bøkur og á bókasøvnunum.
12. At Mentamálaráðið og viðkomandi partar kanna, hvussu ein hóskandi skipan kann gerast fyri bókasavnsgjaldið, tá tað um nettænastur ræður.

Eisini verður mælt til:

13. At Mentamálaráðið saman við Fíggjarmálaráðnum viðger spurningin, um ljóðbøkur og e-bøkur eiga at koma undir ásetingina um MVG frítøku fyri bøkur.
14. At viðkomandi myndugleikar skipa fyri, at føroysk teldutala verður atkomulig hjá øllum.
15. At Mentamálaráðið og aðrir viðkomandi myndugleikar tryggja, at Orðabankin ella líknandi tænasta verður skipað sum fast hald innan skúlaverkið, og at tænastan eisini verður atkomulig hjá borgarum uttanfyri skúlaverkið.

# Hvørjar ljóðbóka- og e-bókatænastur skal landið veita?

Bókasavnslógin staðfestir, at bókasøvnini hava til endamáls at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, og at bókasøvnini til hetta endamál m.a. hava til taks bøkur, ljóðbøkur og teldutøkt tilfar. Í endmálsorðingini fyri bókasøvnini verður sostatt ikki skilt millum pappírsbøkur, ljóðbøkur, e-bøkur ella aðrar miðlar, men enn er ikki skipað útlán av føroyskum e-bókum.

Bókasavnsvirksemið hjá landinum er skipað undir Søvnum Landsins, har kr. 7.690.000 í 2014 vóru settar av til rakstur av Landsbókasavninum og kr. 3.887.000 sum stuðulsjáttan til fólka- og skúlabókasøvn íroknað bókasavnsgjald til rithøvundar.

Landsbókasavnið skrásetur allar ljóðbøkur og e-bøkur, sum koma út á føroyskum. Bókasøvnini lána út ljóðbøkur á fløgu, men ongin nettænasta er ment til føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur.

## Ljóðbókatænastan - frá sjálvbodnum virksemi til almenna tænastu

Tað var Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum, MBF, ið av fyrstan tíð átók sær uppgávuna at geva út ljóðbøkur. Fyrstu árini var ongin serstøk játtan til endamálið, men roynt var sum frægast at fáa útgivið ljóðbókatilfar á føroyskum. Millum annað komu skaldsøgur og annað tilfar, ið hevði verið lisið upp í Útvarpinum, út sum ljóðbøkur.

Í 2002 fekk MBF kr. 128.000 í stuðli frá Almannastovuni eftir umsorganarlógini oyramerkt til blindatænastu. Stuðulin var fyrstu tíðina nýttur til at geva út eina ljóðavís.

Í 2004 kom vend í, tá kr. 400.000 vóru settar av á játtanini hjá Føroya Landsbókasavni sum stuðul til ljóðbókaútgávu. Ætlanin við játtanini var at skapa ein skipaðan karm um ljóðbókaframleiðsluna og harvið eitt grundarlag fyri at menna økið. Henda játtan var løgd saman við játtanini frá Almannastovuni, sum var flutt til Mentamálaráðið. Við samlaðu játtanini kom ein regluligari framleiðsla av føroyskum ljóðbókum í lag.

Komandi árini fór upptøkan av ljóðbókum fram ókeypis í hølunum hjá Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð, meðan framleiðslan av ljóðbókunum fór fram í leigaðum hølum. Leiðarin fyri ljóðbókatænastuna, Margreta Næss, hevur verið í hálvum starvi síðan 2004. Roynt hevur verið at framleitt so stórt tal av ljóðbókum sum gjørligt.

MBF setti ein breiðan bólk av umboðum fyri ymsar stovnar og feløg at velja út bøkur til útgávus. Í ljóðbókanevndini, sum hon varð nevnd, eru umboð fyri Landsbókasavnið, Sjóndepilin, Føroya Blindafelag, Býarbókasavnið, MBF, Nám og Felagið fyri lesi- og skriviveik.

Síðan 1987 eru umleið 300 ljóðbøkur komnar út á føroyskum.

**Ein ljóðbók er ein bók givin út sum ljóðfíla, har dentur er lagdur á at fáa upplesturin so góðan sum gjørligt.**

**Ljóðbøkur verða í høvuðsheitum gjørdar til teirra, ið hava tørv á at fáa tekst lisnan upp, men ljóðbøkur verða eisini brúktar av lesarum, ið fáa brúkt vanligar tekstmiðlar, men sum heldur velja at ”lesa” eina ljóðbók.**

**Ljóðbøkur hava verið framleiddar og margfaldaðar á kasettubond og fløgur. Tøknilig frambrot hava gjørt, at ljóðbøkur nú kunnu vera tøkar. umvegis eina nettænastu, sí eitt nú www.e17.dk.**

Í 2014 var stuðulin til ljóðbókatænastu á løgtingsfíggjarlógini kr. 497.000. Stuðulin verður latin forlagnum Ljóðbøkur til virksemi sítt. Forlagið framleiðir og gevur út ljóðbøkur á fløgum, sum eru tøkar til láns á bókasøvnunum og til keyps í bókahandlum. Forlagið Ljóðbøkur lesur eisini undirvísingartilfar inn eftir áheitan, men eingin serstøk játtan er til at veita lesandi við serligum tørvi tilfar til undirvísingarbrúk.

Í 2002 var forlagið Ljóðbøkur vinnuskrásett, og í 2011 varð forlagið MVG skrásett. Nevndin í forlagnum eru limirnir í ljóðbókanevndini. Í 2013 flutti ljóðbókatænastan "Ljóðbøkur" í leigað høli í J.C. Svabosgøtu 17. Forlagið hevur eina heimasíðu, www.ljodbokur.fo, sum hevur yvirlit yvir ljóðbøkur, hvørjar ljóðbøkur eru til láns á bókasøvnunum og til keyps í bókahandlunum. Umleið 10% av pappírsbókunum, sum koma út árliga, koma eisini út sum ljóðbók, svarandi til eini 25-30 ljóðbøkur.

Sambært forlagnum "Ljóðbøkur" fer ein stórur partur av stuðulsjáttanini til ljóðbókatænastur til tænastur til skúlabrúks, og umleið ein triðingur av tí, sum forlagið Ljóðbøkur gevur út, eru ljóðbókaútgávur av pappírsbókaútgávum hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Í fleiri førum hava útgávurnar verið fíggjaðar soleiðis, at Nám hevur rindað fyri upplestur, meðan ljóðbókatænastan hevur staðið fyri restini, og harvið eisini fingið inntøkur av søluni av ljóðbókini.

Forlagið Ljóðbøkur metir, at útreiðslurnar at framleiða eina ljóðbók eru umleið kr. 100 kr. fyri hvørja síðu. Forlagið hevur tikið avgerð um, at søluprísurin á ljóðbókum skal vera áleið tann sami, sum á pappírsbókum, so at ljóðbøkur ikki eru dýrari fyri brúkararnar enn pappírsbøkur.




*Ljóðbókatænastan í J.C. Svabosgøtu 57. Mynd: Jens Kristian Vang*

## Ljóðbókatænastur aðrastaðni

Bókasavnstænastur til blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik eru í grannalondunum skipaðar á serbókasøvnum.

Í Danmark er bókasavnstænasta til sjónveik og orðblind skipað í Nota, sum er ríkisbókasavn undir Kulturministeriet. Nota lænir út og framleiðir ljóðbøkur, e-bøkur og punktskrift til fólk, ið ikki kunnu lesa vanligan prentaðan tekst, sí www.nota.nu. Tey, ið hava eitt skjalprógvað sjón- ella lesibrek, kunnu gerast limir í Nota og lána bøkur á netbókasavninum e17, sí www.e17.dk. Føroyskir brúkarar hava atgongd til e17, sum eisini hevur nakað av føroyskum tilfari, tó at tað er avmarkað. Tænastan hjá Nota er bert ætlað teimum, ið hava ein skjalprógvaðan tørv á tænastuni. Nota er skipað sambært § 15 í bókasavnslógini, og avtala er gjørd millum Kulturministeriet og Undervisningsministeriet um, at Nota eisini tekur sær av at framleiða undirvísingartilfar til sjónveik og orðblind.

Í Íslandi er bókasavnstænasta til blind, sjónveik og orðblind skipað í Hljóðbókasafni Íslands, sum er ríkisstovnur undir Mennta- og Menningarmálaráðuneytinum. Ljóðbókasavnið er skipað sambært kapitli IV í íslendsku bókasavnslógini, sum ásetir, at uppgávan hjá stovninum er at veita teimum tænastu, ið ikki fáa brúkt vanligar tekstmiðlar, harundir undirvísingartilfar. Stovnurin er skipaður við eini ráðgevandi nevnd.

Í Danmark eru fólkabókasøvnini farin saman við forløgum um at veita ljóðbóka- og ebókatænastur gjøgnum portalin eReolen.dk. Til ber hjá lánarum at heinta niður eitt ávíst tal av e-bókum og ljóðbókum um mánaðin.

## e-bókatænastur

Útgávan av e-bókum hevur vundið nógv upp á seg seinastu árini, og í dag er vanligt, at forløg geva út bøkur sum bæði pappírsbók og e-bók. Í Føroyum hevur útgávan av e-bókum tó ikki ment seg eins skjótt og í grannalondum okkara, men eisini í Føroyum verða fleri og fleri e-bøkur givnar út, eitt nú á forlagnum Sprotanum.

Føroysk forløg selja e-bøkur umvegis e- og ljóðbókaportalin vitra.fo, men enn er eingin avtala gjørd millum forløg og bókasøvn um útlán av føroyskum e-bókum.

Býarbókasavnið í Havn hevur avtalu við danska portalin eReolen.dk, at lánarar kunnu lána eitt ávíst tal av e-bókum og ljóðbókum um mánaðin gjøgnum hesa skipan. Í løtuni kann hvør lánari lána 4 ljóðbøkur og 4 e-bøkur um mánaðin. Føroysk forløg hava tilboð um at vera við í donsku skipanini, men sum er, verður hesin møguleiki ikki brúktur.

Støðan er sostatt, at føroyskar e-bøkur ikki eru til taks á bókasøvnunum, og ljóðbøkur verða læntar út á fløgu og í summum førum kasettubondum. Í so máta má sigast, at tær almennu tænasturnar á økinum eru afturúrsigldar í mun til støðuna aðrastaðni.

**Ein e-bók er ein talgild bók, sum er givin út sum dokumentfíla.**

**E-bókin er ikki forsniðað til eina ávísa pappírsstødd, og kann tí forsniðast til ymiskar skermstøddir og skermupploysnir. PDF format eru tí ikki vælegnað til e-bøkur.**

**Tað ber til at lesa e-bøkur á serligum e-bókalesarum, men eisini á vanligum teldum, teldlum og snildfonum.**

**Føroyskar e-bøkur fáast til keyps umvegis www.vitra.fo, sum er felags søluportalur hjá forløgunum.**

## e-bókatænastur í Danmark

Í Danmark tók útlánið av e-bókum dik á seg umleið 2010, tá ið stóru donsku forløgini veruliga fóru undir e-bókaframleiðslu. Nýtslan er síðan økt munandi. Í 2010 heintaðu brúkarar 176.397 e-bøkur á nettænastunum hjá bókasøvnunum . Hetta talið var í 2013 vaksið til 1,4 mió. útlán av e-bókum. Eisini talið av vitjandi á nettænastunum hjá bókasøvnunum er vaksið sera nógv hesi árini. Kulturstyrelsen metir, at hetta er orsakað av, at nettænasturnar eru lætt atkomuligar, eisini á teldlum. Enn svarar útlánið av e-bókatænastum bert til umleið 5 % av samlaða útláninum á donsku bókasøvnunum, men talið er støðugt vaksandi. Higartil er útlánið farið fram á portalunum eBib og eReolen, har bókasavnsbrúkarar kunnu lána eitt ávíst tal av e-bókum um mánaðin. Donsku bókasøvnini hava ment eReolen, meðan Ebib er ment av teimum stóru donsku forløgunum, sum hava mett, at tey fáa ov lítið burtur úr at vera við í eReolen. Frá 1. januar 2015 var eBib lagt saman við eReolen. Tað merkir, at eReolen komandi ár fer at bjóða fram 9.000 e-bøkur í mun til tær 5.000, ið kunnu lánast í dag. Avtalan hevur tó eisini avmarkingar við sær við tað, at talið á lánarum, ið kunnu lána somu e-bók samstundis, er avmarkað í nýggju skipanini. Hetta verður mett at hava við sær, at forløgini ikki missa so stóran part av søluni, sum undir gomlu skipanini.

Blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik fáa lisið e-bøkur við teldutalu. Hóast teldutala ikki er eins góð og ein ljóðbók, so geva e-bøkur saman við teldutaluni hesum borgarum atgongd til tilfar, sum ikki er tøkt sum ljóðbók.



*Lesikrókur á Landsbókasavninum. Mynd: Annika Smith.*

## Málbólkar hjá almennu ljóðbóka- og e-bókatænastunum

Teir málbólkar, ið nýta almennar tænastur innan ljóðbøkur og e-bøkur, kunnu bólkast í

- Blind og sjónveik
- Sjúk og vanfør
- Orðblind og lesiveik
- Bókasavnsbrúkarar

**Blind og sjónveik**

Vit hava í Føroyum ikki neyv tøl fyri, hvussu stórur partur av fólkinum eru antin blind ella sjónveik, men tøl frá okkara grannalondum vísa, at talan er um 1-2 % av fólkinum, ið hava tørv á sjónráðgeving á ein ella annan hátt. Hesin bólkur er primerur í mun til almennu ljóðbóka- og e-bókatænasturnar, tí hesi hava trupulleika at lesa prentaðan tekst.

**Sjúk og vanfør**

Tað eru fleiri, ið orsakað av sjúku ella vanføri ikki fáa hildið á eini bók, og tí hava stórt gagn av ljóðbókum.

**Orðblind og lesiveik**

Neyv tøl eru ikki fyri tal av orðblindum og lesiveikum, og spennið er eisini vítt frá at vera lættari lesiveikur til at vera orðblindur í heilt stóran mun. Í grannalondunum verður mett, at um 3-5 % eru orðblind í størri ella minni mun. Harafturat koma tey, sum í størri og minni mun eru lesiveik. Út frá kanningum, eitt nú PISA, sum hava verið gjørdar í Føroyum síðan 2006, verður víst á, at stórur partur av fólkaskúlanæmingunum ikki hava ein nøktandi lesiførleika, sum ger tey skikkað at fara víðari í arbeiðslívinum og/ella útbúgvingarskipanini.

**Bókasavnsbrúkarar**

Aðrir málbólkar, umframt bókasavnsbrúkarar sum heild, sum kunnu hava gagn av ljóðbóka- og e-bókatænastum á bókasøvnunum, eru t.d.innflytarar, sjófólk, fólk og lesandi í útjaðara, fjarlesandi, pendlarar, granskarar uttanlands, føroyingar í útlegd og fólk, bæði børn og vaksin, ið ikki hava føroyskt sum fyrsta málið.

## Hvat eigur at verða gjørt

Síðan MBF fór undir sjálvbodna virksemið at geva út ljóðbøkur í 1987, er virksemið nógvment, og tá almenna játtanin í 2004 varð hækkað til ein hálva millión, kom eitt regluligtvirksemi í lag. Játtanin hevur rokkið til ein leiðara/ritstjóra í hálvum starvi, men virksemið hevur verið væl størri og alsamt vaksandi.  Nógv arbeiði hevur tí verið gjørt sjálvboðið hesi árini.

Arbeiðsbólkurin heldur, at stundin nú er komin til at stigið frá sjálvbodna virkseminum til almennu tænastuna verður tikið fult út, og at neyðugt verður við hægri játtan til endamálið, skal virksemið ikki minka munandi.

Arbeiðsbólkurin metir, at almennu tænasturnar á ljóðbóka- og e-bókaøkinum, sum er, ikki eru á einum nøktandi støði, hvørki í mun til tænastustøðið á bókasøvnunum, ella í mun til tænastustøðið til teirra, sum eru blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik.

Sjálvt um føroysk forløg geva út e-bøkur, so ber ikki til at lána føroyskar e-bøkur á bókasøvnunum.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at stig verða tikin til at kanna, hvat skal til, fyri at fáa eina skipan, ið gevur bókasavnsbrúkarum atgongd til at lána føroyskar e-bøkur á bókasøvnunum.

Hjá blindum, sjónveikum, sjúkum, vanførum, orðblindum og lesiveikum, er tað at fáa tekst lisnan upp eitt avgerandi og neyðugt amboð, tí tað gevur atgongd til vitan og kunning, sum allir landsins borgarar eiga sín sjálvsagda lut í. Í ST sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, er ásett, at fólk við breki ikki skulu útihýsast frá vitan og kunning í samfelagnum. Føroyar hava bundið seg til sáttmálan í 2009. Arbeiðsbólkurin metir tí, at tað er ein almenn uppgáva at tryggja eitt nøktandi útboð av ljóðbókum, og at føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur eiga at vera atkomuligar hjá øllum á bókasøvnunum.

Arbeiðsbólkurin heldur harafturat, at tað mentanarpolitiskt er áhugamál hjá landinum, at so nógv føroyskt tilfar sum gjørligt kemur út, og at útgávur av ljóðbókum og e-bókum í størri mun verða ein sjálvsagdur partur av útgávuvirkseminum, serliga tá hugsað verður um atgongd til føroyskt tilfar hjá teimum, ið eru blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind ella lesiveik.

Føroyski marknaðurin fyri bókaútgávu er sera avmarkaður, og tí hevur almenni stuðulin til bókaútgávu stóran týdning og er við til at stimbra bókaútgávu í Føroyum. Hetta er eisini galdandi fyri ljóðbøkur, ið eru sera kostnaðartungar at geva út.

Mett verður, at ein skipan við ískoytisstuðli kann stimbra útgávu av ljóðbókum í Føroyum, og at hetta møguliga eisini kann stimbra útgávuna av e-bókum og útgávuvirkseminum sum heild.

Umframt at lata ískoytisstuðul til útgávu av ljóðbókum, kann útgávuvirksemi stimbrast við, at bókasøvnini lána út ljóðbøkur og e-bøkur umvegis eina nettænastu, og at avtala verður gjørd millum forløg og bókasøvn um gjald fyri útlán.

Eisini kundi verið hugt eftir MVG lóggávuni. Meirvirðirsgjald verður ikki latið av pappírsbókum, netorðabókum og alfrøði, tá tær eru elektroniskar, men ljóðbøkur og e-bøkur eru ikki serskilt nevndar í tí vørubólki, ið gevur frítøku fyri MVG . Fíggjarmálaráðið hevur tulkað tað soleiðis, at MVG skal gjaldast av ljóðbókum og e-bókum. Henda tulking merkir, at mismunur verður gjørdur á teimum, ið kunnu lesa eina pappírsbók, og teimum, ið hava tørv á eini ljóðbók ella e-bók. Ljóðbøkur og e-bøkur eru neyðugir miðlar hjá blindum, sjónveikum, sjúkum, vanførum, orðblindum og lesiveikum, og tí heldur arbeiðsbólkurin, at tað er sera óheppið, at mismunur verður gjørdur í mun til atkomu hjá hesum bólkum. Arbeiðsbólkurin metir, at tað er ein mentanarpolitiskur spurningur at fáa lóggávuna dagførda, so at bøkur verða javnsettar í MVG málum, óansæð um talan er um pappírsbók, ljóðbók ella e-bók, og at Mentamálaráðið eigur at taka spurningin upp við Fíggjarmálaráðið.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er sjálvsagt, at blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik hava nøktandi atgongd til undirvísingartilfar. Arbeitt eigur tí at verða fram ímóti, at undirvísingartilfar og annað tilfar til skúlabrúks, sum verður givið út við almennum stuðli, er atkomuligt hjá øllum, eisini teimum, ið eru blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind ella lesiveik.

Føroyskir brúkarar hava stórt gagn av atgongd til bókasavnið e17.dk. Tað kundi verið umhugsað, at Føroyar fingu eitt skipað samstarv við Nota um at leggja føroyskt tilfar á e17, í øllum førum til ein nøktandi skipan er fingin at virka í Føroyum.

Visjónin er, at almennu ljóðbóka- og ebókatænsturnar verða mentar munandi.

# Skipan av ljóðbókatænastuni

Sum ljóðbókatænastan verður rikin í dag, er virksemið býtt millum tænastur til blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik og sølu til almenningin. Forlagið Ljóðbøkur er skipað sum forlag við egnum roknskapi, sum í 2013 vísti, at forlagið hevði samlaðar inntøkur á kr. 693.604, harav kr. 497.000 vóru stuðul frá landinum, annar stuðul var kr. 10.000, og inntøkur frá sølu av ljóðbókum var kr. 186.604. Tað sæst sostatt, at inntøkur frá sølu av ljóðbókum er ein týðandi partur av inntøkugrundarlagnum hjá forlagnum Ljóðbøkur.

Sum er, er ljóðbókatænastan skipað sum forlagsvirksemi stuðlað av landinum. Virksemið er í høvuðsheitum skipað soleiðis:

- Forlag á privatrættarligum grundarlagi
- Stuðulsjáttan á fíggjarlógini
- Leiðari, sum virkar sum ritstjóri, og framleiðari, settur hálva tíð
- Tímalønt starvsfólk
- Ljóðbókanevnd, ið er stýri og bókavalsnevnd
- Leigað høli

Við hesi skipan hevur virksemið verið fylgjandi:

- 10 % av føroysku bókunum útgivnar sum ljóðbøkur
- Undirvísingartilfar framleitt eftir tørvi so vítt møguligt

Forlagið ”Ljóðbøkur” hevur víst á, at ljóðbókatænasta er ein tænasta, ið tað almenna eigur at varða av, og sum tað ikki er eitt marknaðarligt grundarlag fyri. Harafturat kemur, at framleiðsla av undirvísingartilfari til blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik er ein alt størri partur av virkseminum. Tí verður ikki mett, at ljóðbókatænastan kann skipast sum eitt forlag, sum verður rikið á privatrættarligum grundarlagi.

Forlagið Ljóðbøkur vísir á, at verandi skipan er ikki burðardygg. At leiðarin fyri ljóðbókatænastuna er settur hálva tíð, er ikki nøktandi, tí virksemið er víðfevnt og vaksandi. Tíðin er farin frá, at virksemi av hesum slag verður rikið á sjálvbodnum grundarlagi. Mælt verður tí til, at leiðari verður settur fulla tíð, og at tøkningur verður settur at taka sær av framleiðsluni.

## Hvat eigur at verða gjørt

Í bókasavnslógini, § 22, verður ásett, at tað áliggur Landsbókasavninum at útvega ljóðbøkur til teirra, ið hava serligan tørv á hesum, eins og tað áliggur Landsbókasavninum at skipa fyri, at nevnda tilfar verður atkomuligt hjá brúkarum á bókasøvnum landsins. Tað áliggur sostatt longu Landsbókasavninum at veita bókasavnstænastu til tey, ið hava serligan tørv á ljóðbókum.

Verður miðað, eftir at ljóðbókatænastan verður partur av einum almennum stovni, verður mett, at Landsbókasavnið undir Søvnum Landsins, sum varðar av uppgávuni at útvega ljóðbøkur til teirra, ið hava serligan tørv, er rætti stovnurin. Hetta er eisini í tráð við, at ljóðbókatænasturnar í grannalondunum eru skipaðar sum serbókasøvn, sum eru serliga ætlað blindum, sjónveikum, sjúkum, vanførum, orðblindum og lesiveikum.

Virksemið hjá ljóðbókatænastuni i Føroyum er somikið lítið, at arbeiðsbólkurin metir, at tað loysir seg betri, at tænastan verður skipað sum partur av Landsbókasavninum heldur enn, at ljóðbókatænastan verður ein sjálvstøðugur stovnur. Á henda hátt ber møguliga eisini til at fáa synergi við tað, at ein skipan kann verða gjørd til útlán av ljóðbókum og e-bókum á netinum, ið bæði er ætlað teimum, ið hava serligan tørv og øðrum bókasavnsbrúkarum. Avgerandi er tó, at Landsbókasavnið fær neyðugu játtanina at reka ljóðbókatænastuna á einum nøktandi støði.

Verður ljóðbókatænastan skipað sum ein partur av Landsbókasavninum, kann ljóðbókanevndin verða skipað sum ein ráðgevandi nevnd í spurningum um tænastur og bókaval, heldur enn í dag, har ljóðbókanevndin er skipað sum ein nevnd, ið eisini hevur fíggjarliga ábyrgd av forlagnum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at ljóðbókatænastan í høvuðsheitum verður skipað soleiðis:
- Eind undir Landsbókasavninum
- Rakstrarjáttan á fíggjarlógini
- Nøktandi arbeiðsorka verður sett av
- Ljóðbókanevnd, ið er ráðgevandi og samskipandi
- Nøktandi hølisumstøður

Mælt verður til, at virksemið fevnir um:
- 25 % av føroysku bókunum útgivnar sum ljóðbøkur
- Nøktandi undirvísingartilfar
- Nettænastu, har ljóðbøkur og e-bøkur eru atkomuligar saman við viðkomandi amboðum
- Menning, samskipan og tøknilig ráðgeving

Vandin at verða burtur í einum størri stovni, kann mótvigast við, at uppgávan at veita ljóðbókatænastu verður nágreinað í eini dagførdari bókasavnslóg.



*Í studio á Ljóðbókatænastuni. Mynd: Jens Kristian Vang*

# Skipan av ljóðbóka- og e-bókatænastum á netinum

Sum er framleiðir ljóðbókatænastan ljóðbøkur á fløgu, ið kunnu lánast á bókasøvnum ella keypast í bókahandlum. Tøkniliga er tíðin komin til, at ljóðbøkurnar verða lagdar á ein internetportal ella nettænastan har tær kunnu heintast.

Hetta fer at lætta um atgongdina til ljóðbøkurnar, og hevði eisini havt við sær, at minni orka skal til at halda goymslurnar av fløgum. Havast skal í huga, at tað framvegis verða brúkarar, ið nýta fløgur, og at hesin møguleiki eigur at vera til taks.

Ein føroyskur ljóðbóka- og e-bókaportalur er á vitra.fo. Vitra er eitt felags átak millum forløg og útgevarar, sum forlagið Sprotin hevur tikið stig til. Endamálið við Vitru er at selja og at kunna um føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur. Tøkniliga sæð er tað onki, ið forðar fyri, at brúkarin fær atgongd til at lána og keypa bæði ljóðbøkur og e-bøkur á sama palli.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt møguleikan, at forløgini og bókasøvnini fara saman um eina nettænastu, ið bæði fevnir um sølu og útlán av ljóðbókum og e-bókum, og sum kann verða brúkt av blindum, sjónveikum, sjúkum, vanførum, orðblindum og lesiveikum umframt bókasavnsbrúkarum og borgarum, ið ynskja at keypa ljóðbøkur og e-bøkur.

Fyri bókasøvnini hevur tað avgerandi týdning, at tað ikki er neyðugt fyri borgaran at skráseta seg sum brúkara aðrastaðni enn á bókasavninum fyri at sleppa at lána ljóðbøkur og e-bøkur. Sum er skrásetir Landsbókasavnið e-bøkur í bókasavnsgrunninum Aleph, men enn eru avtalur ikki komnar upp á pláss við forløgini, soleiðis at tilfarið kann verða lænt út. Tøkniliga ber hetta tó til í skipanini ADAM, ið er ein goymsla til talgilt tilfar.

Bókasøvnini hava áður víst á, at tørvur er á at fáa nágreinað, hvussu ein skipan við e-bókatænastu á føroysku bókasøvnunum kann verða skipað, og at játtan eigur at verða sett av til endamálið at gera slíka nágreining.

## Hvat eigur at verða gjørt

Arbeiðsbólkurin heldur, at landið eigur at skipa fyri, at føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur kunnu verða læntar á bókasøvnunum umvegis eina nettænastu. Mentamálaráðið, kommunurnar, bókasøvnini og forløgini eiga at arbeiða fram ímóti einum uppskoti um, hvussu skipað kann verða fyri útláni av ljóðbókum og e-bókum á bókasøvnunum umvegis netið. Til hetta krevst, at komið verður ásamt um eina skipan, har bókasøvnini rinda forløgunum fyri, at bókasavnsbrúkarar fáa atgongd til at lána eitt ávíst tal av ljóðbókum og e-bókum um mánaðin.

Í sama viðfeingi eigur ein skipan at verða gjørd til tey, ið eru blind, sjónveik, sjúk, orðblind ella hava ein skerdan lesiførleika, ið ger, at tey eiga at fáa óavmarkaða atgongd til ljóðbøkur og e-bøkur á netinum.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er vert at kanna, um ein loysn kann finnast, ið bæði tænir teimum, ið hava serligan tørv og bókasavnsbrúkarum í einum. Áhugavert er eisini at kanna, um sama loysn kann verða brúkt til at lána bøkur og keypa bøkur. Arbeiðsbólkurin metir, at ein slík loysn hevði kunna stimbrað marknaðin fyri ljóðbøkur og e-bøkur, og á tann hátt eisini verið við til at stimbrað útgávuvirksemið. Á Sprotanum, ið rekur Vitra í samstarvi við onnur forløg, er ætlanin at menna eina app, ið bæði kann handfara keyp og lán.

Tað er arbeiðsbólkinum greitt, at við verandi játtan á løgtingsfíggjarlógini ber ikki til hjá bókasøvnunum at fara undir skipað útlán av føroyskum ljóðbókum og e-bókum á netinum. Arbeiðsbólkurin vil tí mæla til, at fyrsta stigið verður at meta um fíggjarliga tørvin á, at føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur verða tøkar á bókasøvnunum, og at tað í sama viðfangi verður umhugsað, um ein felags loysn eigur at verða funnin, ið ger ljóðbøkur og e-bøkur atkomuligar á netinum, bæði umvegis bókasøvn og bókahandlar, og bæði til blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind, lesiveik, bókasavnsbrúkarar sum heild, og tey ið ynskja at ogna sær ljóðbøkur ella e-bøkur.

Mælt verður til, at greiningin av ljóðbóka- og e-bókatænastunum verður skipað sum ein verkætlan, og at verkætlanarleiðari verður settur at standa fyri greiningini.




*Myndil av eini føroyskari ljóð- og e-bókaapp. Mynd: Sonja Kjølbro*

# Tøkniligir spurningar

Tá spurt verður um, hvørjar ljóðbóka- og e-bókatænastur tað almenna eigur at veita, eru tað eisini onnur tøknilig amboð til blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik, ið hava áhuga, og sum kunnu stuðla undir, at hesir bólkar fáa atgongd til bøkur og annað tilfar.

Sjálvt um ljóðbøkur og e-bøkur eru hvør sítt, kunnu tekstir, sum verða útgivnir sum e-bók, í summum førum vera eitt bíligt og skjótt alternativ til eina ljóðbók, tá eitt amboð verður knýtt at, sum ger, at e-bókin kann verða lisin upp. Amboðini eru fleiri, og her verða teldutalan og Orðabankin umrødd.

**Teldutalan**
Teldutalan verður nýtt í forritum so sum ReadSpeaker, CD-Orð, Orðabankanum og mongum øðrum hjálparforritum, sum eru amboð, ið stuðla undir, at blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik fáa atgongd til bøkur og annað tilfar.

Fyrsta føroyska teldutalan, nevnd Sjúrður, kom í 2005. Í 2013 komu teldutalurnar Hanus og Hanna, sum eru mentar til tær nýggju tøkniligu avbjóðingarnar, og har sjálv talan er munandi betur.

Føroyska teldutalan við Honnu og Hanus er grundað á ein ljóðdátugrunn, ið er bygdur upp við smáum pørtum av ljóði, ið eru lisin inn. Tá eitt hjálparforrit verður sett at lesa eina e-bók ella eina heimasíðu, verða ljóðpartar úr ljóðdátugrunninum settir saman til ein samanhangandi upplestur. Teldutalan er sostatt eftirgjørd tala, sum er sett saman av ljóðbrotum av vanligari talu. Teldutalan kann brúkast til ymisk hjálparforrit og á ymiskum kt-loysnum. Tað er fyritøkan Acapela, ið hevur ment føroysku teldutaluna.

Teldutalan er best egnað til styttri tekstir, og sum er, er eingin ivi um, at ljóðbókin framvegis er neyðug, serliga tá tað kemur til skaldsøgur og annan longri tekst, ið skal hava eitt listarligt snið, tá hann verður lisin.

Tað er grunnurin Føroysk Teldutala, ið hevur tikið stig til menning av eini føroyskari teldutalu. Verkætlanin er stuðlað av Mentamálaráðnum, sum umvegis Nám hevur fíggjað ein munandi part av verkætlanini at menna taluna. Við hesum stuðli var sáttmáli fingin í lag, sum gav skúlaverkinum atgongd til taluna, so hon kundi brúkast saman við Orðabankanum.

**Orðabankin**
Lesi- og skriviamboðið Orðabankin er úrslitið av eini verkætlan, ið Føroya Skúlabókagrunnur fór undir í 2005. Tað hevur verið ein drúgv tilgongd at fáa Orðabankan at virka sum eitt støðugt og skipað amboð, sum skúlaverkið kann brúka. Verkætlanin virkar enn sum royndarhald, og sambært Námi eru ósvaraðir spurningar viðvíkjandi framhaldandi fígging og menning av orðabankanum til nýggjar tøkniligar avbjóðingar.

Forritið Orðabankin er eitt amboð, ið hjálpir talu-, lesi- og skriviveikum at lesa og skriva. Orðabankin brúkar teldutaluna til at lesa tekst upp úr fílum og ger uppskot til, hvussu eitt orð skal stavast. Forritið Orðabankin er ment av fyritøkuni Auxilior Technology. Avtalan millum fyritøkuna, ið hevur ment Orðabankan, og Nám, ið hevur fíggjað menningina av Orðabankanum, er bert galdandi fyri skúlaverkið.

## Amboð í skúlaverkinum

Í skúlaverkinum verða sostatt ymisk átøk gjørd at lætta um atgongd til tilfar, men arbeiðsbólkurin metir, at tað er ein stórur trupulleiki, at tær ymsu skipanirnar ikki altíð virka saman.

Sum dømi kann nevnast, at Orðabankin, sum er, ikki virkar til Apple teldur og til teldlar. Fleiri skúlar (eitt nú Tórshavnar kommunuskúli), ið lata næmingunum teldlar, hava valt iPad'ar, og har virkar Orðabankin sostatt ikki. Trupulleikin er eisini, at royndarhaldið til Orðabankan skal endurnýggjast annanhvønn mánað. Hetta hevur við sær, at brúkarar av Orðabankanum ofta koma í ta støðu, at atgongdin til Orðabankan er stongd. Arbeitt hevur í longri tíð verið við skipanini, uttan at tað er eydnast at koma á mál.

Í mun til at gagnnýta Orðabankan, er tað harafturat ein vansi, at talgildu Landsroyndirnar bert hava koyrt á Firefox, meðan Orðabankin ikki virkar á Firefox. Næmingar við skerdum lesiførleika hava tí higartil ikki fingið gangnnýtt Orðabankan til Landsroyndina.

Nevnast kann eisini, at Nám ikki í løtuni gevur út e-bøkur, men hevur eitt savn av PDF fílum á skúlaportalinum First Class, og at skúlaverkið kann keypa sær atgongd til savnið. PDF savnið kann vera lisið upp við teldutaluni, men ikki við Orðabankanum, sum er tað amboðið, sum Nám hevur keypt til lesi- og skriviveik. Harafturat er Nám farið undir at geva undirvísingartilfar út sum samvirknar bøkur, sonevndar s-bøkur, og spurnartekin er sett við, hvussu blind og sjónveik klára ta avbjóðingina.

**Ein s-bók er ein samvirkin bók, sum verður lýst sum ein sjálvstøðug talgild útgáva.**

**Ein s-bók virkar eins og ein heimasíða, og er skipað sum ein bók, har samvirkið tilfar kann verða lagt afturat, so sum video, ljóð, spurnarkappingar v.m.**

## Hvat eigur at verða gjørt

Nógvir áhugapartar og aktørar eru á økinum, tá talan er um ljóðbøkur og e-bøkur og almennar tænastur í hesum sambandi.

Fyri at veita blindum, sjónveikum, sjúkum, vanførum, orðblindum og lesiveikum eina so góða tænastu sum gjørligt, heldur arbeiðsbólkurin, at tørvur er á eini yvirskipaðari visjón fyri økið, og at økið verður samskipað í eini strategiskari ætlan, serliga í mun til tøkniligu menningina á økinum, men eisini í mun til tað alment stuðlaða virksemið á økinum.

Arbeiðsbólkurin  heldur, at menningin av amboðum til blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik eigur at verða samskipað, soleiðis at tað í mestan mun verður tryggjað, at tey, ið hava tørv á hesum amboðum, fáa eina so góða tænastu, sum gjørligt. Arbeiðsbólkurin metir, at viðkomandi partar, so sum Nám, Sjóndepilin, MBF, Grunnurin Føroysk Teldutala og onnur eiga at verða við til at orða ætlanina, og at ljóðbókatænastan eigur at samskipa og varða av strategisku ætlanini.

Serliga í mun til útgávu og framleiðslu av undirvísingartilfari og tilfari og amboðum til skúlabrúks annars er neyðugt, at ljóðbókatænastan og undirvísingarverkið virka í tøttum samstarvi, soleiðis at tænastan mótvegis teimum, ið hava tørv á hesum tilfari og amboðum er so góð sum yvirhøvur gjørligt.

Teldutalan, Orðabankin og líknandi amboð eru sera hent hjá primeru málbólkunum, ið brúka ljóðbøkur og e-bøkur. Arbeiðsbólkurin heldur, at tá so nógv orka verður løgd í at fáa bøtt um fortreytirnar hjá teimum, ið hava skerdan lesiførleika, so er tað hugstoytt, at tað framvegis eru tøkniligar og fíggjarligar forðingar fyri, at Orðabankin virkar eftir ætlan.

Arbeiðsbólkurin heldur harafturat, at tey amboð, ið verða ment við almennum stuðli, ikki eiga at vera avmarkað til skúlaverkið, men eiga at vera atkomulig hjá øllum, ið hava tørv á teimum. Tað hevði eitt nú verið stórt framstig, um Orðabankin ella líknandi forrit var tøkt hjá øllum at brúka.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er vert at kanna, í hvønn mun almennar og privatar tænastur viðvíkjandi ljóðbókum og e-bókum kunnu verða samskipaðar í mun til framleiðslu av tilfari og í mun til útlán og sølu á netinum. Havast skal tó í huga, at blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiverk hava tørv á serligum atliti til atkomu á eini nettænastu.

# Rættarligir spurningar

Í mun til upphavsrættin eru fleiri rættindahavarar knýttir at útgávu og útláni av ljóðbókum og e-bókum. Reglur um upphavsrætt eru skipaðar í løgtingslóg um upphavsrætt og í tilhoyrandi kunngerðum.

Í galdandi løgtingslóg um upphavsrætt verður ásett í § 17, at landsstýrismaðurin í kunngerð ger neyvari reglur um, nær, hvar og hvussu vard verk kunnu nýtast til sjón- og hoyriveik. Nevnast kann, at Mentamálaráðið arbeiðir við at dagføra lóggávuna á økinum, soleiðis at ásetingarnar um nýtslu av vardum verkum til fólk við lesi- og hoyritarni framyvir koma at verða orðaðar í lóg heldur enn í kunngerð.

Galdandi løgtingslóg um upphavsrætt ásetir í § 40, at felagsskapir, við loyvi frá landsstýrismanninum, kunnu umboða allar rættindahavarar innan ávísar listagreinar, uttan mun til, um rættindahavararnir eru limir í ávísum felag, eitt nú Leikarafelagnum ella Rithøvundafelagnum.

Í sambandi við útgávu av ljóðbókum, koma - afturat teimum rættindunum, ið eru knýtt at pappírsbókaútgávu - rættindini hjá teimum, ið lesa upp ljóðbøkur. Afturat lønini fyri at lesa ljóðbókina inn, hava upplesarar rætt til viðurlag.

Tá Ljóðbókatænastan gevur út ljóðbøkur, verður avtala gjørd, har rithøvundur og upplesarin fáa sama gjald, sum er 10 kr./min, meðan týðarin fær helvtina.

Tað hevur í ávísum førum víst seg at vera trupult at fáa greiðar avtalur við útlendsk forløg um útgávur á føroyskum, tí uppløgini eru so lítil, so at áhugin fyri at gera avtalur er avmarkaður.

Sum heild kann sigast, at tað eru stórir trupulleikar við upphavsrætti, tá tað snýr seg um elektroniskar miðlar og útreiðslu á netinum. Eitt nú eru viðurskiftini ikki greið, tá tað kemur til rættindini hjá upplesarum í sambandi við útlán av ljóðbókum.

## Stovnar og feløg

Føroysk feløg í sambandi við rættindi eru:

- Rithøvundafelagið
- Leikarafelag Føroya
- Fjølrit

**Rithøvundafelagið**

Rithøvundafelagið hevur avtalu við Fjølrit um at umboða limir sínar í upphavsrættarligum málum. Fjølrit hevur síðan, sambært upphavarættarlógini, gjørt avtalu við Mentamálaráðið um, at Fjølrit eisini umboðar rithøvundar, ið ikki eru limir í Rithøvundafelagnum, í málum um upphavsrætt.

**Leikarafelag Føroya**

Leikarafelag Føroya er komið undir land við avtalu um, at danska felagið Filmex umboðar limirnar, tá tað kemur til krøv í sambandi við upplestur, sjónvarp, film og aðrar miðlar. Leikarafelagið vónar, at ein avtala við Filmex fer at verja rættindini hjá limunum í nógv størri mun enn í dag, tá leikarar ofta bert fáa samsýning fyri sjálvt arbeiðið at lesa inn. Kemur avtala í lag, merkir tað, at Filmex umboðar allar rættindahavarar á økinum, eisini tey, ið ikki eru limir í Leikarafelagnum.

**Fjølrit**
Fjølrit, ið umboðar Rithøvundafelag Føroya, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Myndlistafólk og Føroya Blaðmannafelag, er einasta føroyska felagið, ið umboðar rættindahavarar sambært upphavsrættarlógini. Annars eru tað Koda og Gramex, ið umboða føroyskar rættindahavarar, tá tað kemur til tónaskøld og tónleik.

Aðrir stovnar og feløg, ið arbeiða við útgávum av ljóðbóka- og/ella e-bókatilfari eru:

**Kringvarp Føroya**
Tey fyrstu árini var meginparturin av tí tilfari, sum varð gjørt til ljóðbøkur, tilfar, sum Útvarp Føroya hevði keypt rættindini til og hevði loyvi til at lata gera til ljóðbøkur.

Tá ein bók verður lisin upp í Kringvarpinum, hevur tað verið vanligt, at týðarin hevur fingið gjald fyri tað sum eitt slag av løn.

Kringvarpið hevur sett kr. 250.000 av til at gjalda til rættindahavarar. Tað er LISA, ið umsitur upphæddina og stendur fyri útgjaldi til rithøvundar.

**Sprotin**
Forlagið Sprotin hevur rættindini til 52 ljóðbøkur, ið eru fingin til vega frá Kringvarpinum og forlagnum Ljóðbøkur.

Sprotin kundi hugsað sær ein grunn, har søkjast kann um stuðul til ljóðbókaútgávu, so at tey kundu givið út fleiri ljóðbøkur. Kostar ein ljóðbók umleið kr. 20.000 at framleiða, hevði tað gjørt stóran mun at fingið kr. 10.000 í stuðli. Á tann hátt hevði útgávan kunnað svarað seg fíggjarliga, og hetta hevði stimbrað útgávu av ljóðbókum. Sprotin gevur allar sínar pappírsbøkur út sum e-bøkur, og tey merkja ein vaksandi eftirspurning.

**Nám og Bókadeild Føroya Lærarafelags**
Nám og Bókadeild Føroya Lærarafelags geva út meginpartin av tí, ið verður givið út til skúlabrúks og til børn og ung. Ljóðbøkur verða givnar út í samstarvi við Ljóðbókatænastuna, men forløgini geva ikki nógvar e-bøkur út. Nám er farið undir at geva út s-bøkur.

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur sæð upplestur í Útvarpinum sum eitt slag av PR fyri bøkur, ið tey hava givið út, tí tað sæst aftur í sølutølunum, tá ein bók hevur verið lisin upp í Kringvarpinum.

**Avtalur**
Tá ein ljóðbók ella e-bók verður givin út, gera forløgini avtalu við rættindahavarar fyri eitt ávíst upplag og ávíst tíðarskeið. Í sambandi við uppafturprent eru royalties um 10% fyri ljóðbøkur og 25 % fyri e-bøkur.

Gjald fyri e-bøkur verður gjørt upp einaferð um árið, og tað verður gjørt einfalt umvegis søluskipanina.

## Hvat eigur at verða gjørt

Arbeiðsbólkurin heldur, at miðað eigur at verða eftir, at allir rættindahavarar til ljóðbókaútgávu verða umboðað av felagi, eitt nú Fjølrit ella øðrum, soleiðis at forløg kunnu avgreiða spurningar um rættindi og avrokna á einum staði, heldur enn at skulu gera avtalur við hvønn rættindahavara sær.

Harafturat verður mett, at tað hjá forløgum er einfaldast, um rættindi verða fingin til pappírsútgávu, e-bókaútgávu og ljóðbókaútgávu í sama sáttmála.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað í mun til rættindaligar spurningar snýr seg um at gera tað møguligt og so ómakaleyst sum gjørligt at geva ljóðbøkur út, eisini í mun til avrokning við rættindahavarar.

Í mun til útlán av e-bókum á bókasøvnum og í mun til útlán av ljóðbókum á netinum er neyðugt, at avtalur verða gjørdar millum rættindahavarar og bókasøvnini. Tað kann eisini verða neyðugt at avtalur verða gjørdar um gjald millum bókasøvn, um borgarar brúka onnur bókasøvn enn bókasavnið í bústaðarkommununi.

Í mun til bókasavnsgjaldið fyri bókasavnstænastur á netinum má ein skipan gerast, ið tekur støðu til, hvussu rættindahavarar verða avroknaðir.




*Skaldsøgan Bábelstornið er útgivin sum ljóðbók og e-bók. Mynd: Sonja Kjølbro.*

# Niðurstøða um tørv á umlegging og nýskipan

Arbeiðsbólkurin hevur í hesum áliti víst á, at tørvur er á at menna almennu ljóðbóka- og e-bókatænasturnar.

Tørvur er á at fáa fíggjarligar og skipanarligar karmar, ið loyva, at ljóðbøkur og e-bøkur verða atkomuligar á netinum, og at almennu tænasturnar á økinum verða mentar í mun til útgávuvirksemi og samskipan av tænastunum til undirvísingarverkið. Mælt verður í hesum sambandi til, at játtanin til økið verður raðfest á komandi fíggjarlóg.

Arbeiðsbólkurin hevur ført fram, at tað í bókasavnslógini eru ásetingar, ið mugu metast at fevna um ljóðbókatænastu og e-bókatænastu, tó at e-bøkur ikki eru beinleiðis nevndar í lógini.

Arbeiðsbólkurin er komin til ta niðurstøðu, at ljóðbókatænastan eigur at verða flutt á Landsbókasavnið, har tænastan eigur at verða samskipað við eina e-bókatænastu og eina tænastu, ið samskipar tøkniligu menningina á økinum. Avtala eigur at verða gjørd millum avvarðandi partar um, hvussu blind, sjónveik, sjúk, vanfør, orðblind og lesiveik fáa atgongd til nøktandi undirvísingarmiðlar. Mett verður, at tær tænastur, ið tað almenna fíggjar innan ljóðbøkur og e-bøkur, eiga at verða samskipaðar og mentar á ein so skynsaman hátt sum gjørligt, fyri harvið at vera einum so stórum parti av borgarum landsins at gagni sum gjørligt.

## Verkætlan

Í mun til umlegging og nýskipan av ljóðbóka- og e-bókatænastunum er tørvur á at nágreina, hvussu hesar tænastur kunnu fáast at virka, og hvussu nógv arbeiðsorka skal setast av til at reka almennu ljóðbóka- og e-bókatænasturnar. Arbeiðsbólkurin metir tí, at tørvur er á at skipa eina verkætlan, ið kann útgreina, hvussu ljóðbókatænastan skal virka framyvir, og hvussu ein e-bókatænasta kann fáast at virka á bókasøvnum landsins.

Tað er tó umráðandi, at framleiðslan av ljóðbókum heldur fram ótarnað, meðan ljóðbókatænastan verður umløgd frá einum forlagi á privatrættarligum grundarlagi, ið fær stuðul á fíggjarløgtingslógini, til at verða rikin sum partur av einum almennum stovni.

Mælt verður tí til, at verkætlanarleiðari verður settur, ið skal útgreina fíggjarliga tørvin og fakliga innihaldið í eini umskipaðari ljóðbókatænastu og eini nýskipaðari e-bókatænastu og fyrireika verksetan av umlagda og nýskipaða virkseminum á Landsbókasavninum.

Mælt verður til, at verkætlanarleiðari verður settur at útgreina og fyrireika ljóðbókatænastu og e-bókatænastu undir Landsbókasavninum, og at verkætlanarleiðarin verður løntur av játtanini stuðul til ljóðbókatænastu.

ISBN 978-99918-852-5-4

MENTAMÁLARÁÐIÐ